LØGMÁLARÁÐIÐ

# Stjóri til Føroya Kærustovn

Við hesum verður søkt eftir stjóra til Føroya Kærustovn.

**Høvuðsuppgávur**
Føroya Kærustovnur leggur til rættis fyrireiking og avgreiðslu av kærumálum og samskipar og leggur til rættis virksemið hjá hesum kærunevndum:

- Kærunevndin í almanna- og heilsumálum
- Skatta- og avgjaldskærunevndin
- Kærunevndin í lendismálum
- Kærunevndin í útbúgvingarstuðulsmálum
- Vinnukærunevndin

Harafturat er Kærustovnurin skrivstova hjá skuldarumskipanarnevndini.

**Førleikakrøv**
Tað verður sett sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv, hollar løgfrøðiligar royndir og analytisk evni, og at teir hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

Harumframt verður sett sum treyt, at teir hava hollar royndir frá almenna og / ella privata arbeiðsmarknaðinum.

Umframt hetta verður væntað, at umsøkjarar duga og hava áhuga fyri leiðslu.

**Løn og setanartreytir**
Starvsheitið er stjóri, og verður lønt ájavnt 37. lønarflokk hjá tænastumonnum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Setanartreytir vera sambært avvarðandi sáttmála.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til:

*Løgmálaráðið*
*Postrúm 159*
*Tinganes*
*110 Tórshavn*

og skulu vera Løgmálaráðnum í hendi í seinasta lagi tann 1. august 2008.

Umsøkjarar kunnu fáa nærri upplýsingar um starvið við at venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra, tlf. 358080.

---

**Um stovnin:** Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir løgmálaráðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til kærunevndina í almanna- og heilsumálum, skatta- og avgjaldskærunevndina, kærunevndina í lendismálum, kærunevndina í útbúgvingarstuðulsmálum, og vinnukærunevndina. Harumframt er stovnurin skrivstova hjá skuldarumskipanarnevndini. Á stovninum starvast í løtuni átta fólk: stjórin, tríggir løgfrøðingar og fýra skrivstovufólk.






## Søkt verður eftir Netumsitara

KT-fyrisitingin søkir eftir einum starvsfólki til netumsiting av LandsNET. Starvið inniheldur bæði netansing, netumsiting og tilrættalegging av broytingum (Change Management) á netøkinum.

KT- fyrisitingin er ein deild í Fíggjarmálaráðnum, ið tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild.

KT-fyrisitingin útvegar undirstøðukervi, felags nýtsluskipanir og standardforrit, sum fyrisitingarligar eindir hjá landinum kunnu fáa atgongd til. Hetta undirstøðu kervið verður nevnt LandsNET, og er eitt rættuliga stórt kt-kervi við yvir 500 brúkarum, og støðugt vaksandi.

**Starvið:**
Í dag starvast seks fólk í KT-fyrisitingini. Harav starvast trý fólk í KT-skivuni, hvørs uppgáva í høvuðsheitum er at ráðgeva og vegleiða teldubrúkarum, tá hesir hava tørv á hjálp. Talan kann verða um ráðgeving og vegleiðing í nýtslu av felags nýtsluskipanunum og standardforritum ella meiri tekniskari hjálp. Uppgávan hjá netumsitarum er:

**Arbeiðsuppgávur:**
- at vaka yvir kervið hjá LandsNET.
- at tryggja skipaða tilrættalegging av ætlaðum broytingum á LandsNET kervinum.
- at taka ímóti fyrispurningum frá KT-skivuni um LandsNET kervið sum "2. lið" í tænastuketuni.
- at senda fyrispurningar víðari til serkøn innan KT um tørvur er.
- at umsita øll LandsNET kervisviðurskifti sum heild.
- at tryggja at LandsNET kervið virkar trygt og best gjørligt til eina og hvørja tíð, innanfyri givnu karmarnar.
- at samstarva og samskipa við tænastuveitarum, KT-fyrisiting og øðrum, ið skulu arbeiða saman um netviðurskifti hjá LandsNET.

Talan er um ein nýtt starv í eini rættiliga nýggjari fyrisiting, og skal tann, sum settur verður tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum av umsøkjarum, at teir hava:
- Viðkomandi KT-útbúgving (datamatikara, datanom ella líknandi)
- Kunnleika og royndir innan netumsiting
- Kunnleika og royndir innan almenna og privata fyrisiting
- Royndir við Cisco Works
- Hegni til at tilrættaleggja broytingarætlanirnar hjá LandNET trygt og skilagott í samstarv við restina av KT-fyrisitingini, brúkarar og veitarar hjá KT-fyrisitingini.
- Ídni, áræði og góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
Vit bjóða eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi, ið tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa. Til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi. Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har ið tú fer at arbeiða í tøttum samstarvi við starvsfólkini í landsfyritøkuni. Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Setanin umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur stjórnarráð.

**Umsóknir:**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**KT-fyrisitingin**
Reyngøta 24
Postsmoga 2039
FO-165 Argir

Umsóknir skulu vera KT-fyrisitingini í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. august, 2008. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Gunnar Toftegaard, deildarstjóra, tlf. 55 60 78.

VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Stjóri fyri Føroya Altjóða Skipaskrá og Skráseting Føroya

Tú er ein kreativur leiðari, sum dámar at skapa, fyrisita, samskifta og samskipa, og tú hevur tev fyri marknaðarføring.

Í sambandi við at Skráseting Føroya og Føroyska Altjóða Skipaskrásetingin verða løgd saman í ein nýggjan vinnustovn, søkir Vinnumálaráðið stjóra til nýggja stovnin.

Dámar tær avbjóðingar, átti tú at søkt sera spennandi starvið sum stjóri á nýggjum stovni undir Vinnumálaráðnum.

**Starvið**
Stjórin skal uppbyggja nýggja stovnin og vera við til at skapa karmar fyri vinnuna á økinum, hava ábyrgd fyri umsitingini av vinnulógunum og fremjanini av eftirlitinum og av marknaðarføringini av Føroysku Altjóða Skipaskránni.

Nýggi stovnurin fer at virka sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi lóggávu og vinnupolitikki landsins á økinum, og høvuðsuppgávurnar sambært hesum verða:

- At umsita vinnulógirnar – vinnufelagalógirnar og ársroknskaparlógina
- At umsita lógina fyri Føroysku Altjóða Skipaskránna
- At marknaðarføra Føroysku Altjóða Skipaskránna

**Førleikar**
Tú hevur hóskandi útbúgving á kandidatstøði, og tað er ein fyrimunur, um tú hevur loyst líknandi uppgávur í verki annaðhvørt í privata vinnulívinum ella í almennu umsitingini; men tað er eingin treyt.

Vit vænta, at tú hevur sterkar persónligar eginleikar, so sum arbeiðssemi, dynamikk, leiðaraevni og skapanarlyndi, og tú kennir til føroyska vinnu sum heild. Tú dugir væl við fólki, samskiftir skilliga bæði á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli og hevur evni og vilja at skapa eitt stimbrandi umhvørvi.

**Vit bjóða**
Starvið sum stjóri á nýggja stovninum er sera spennandi og avbjóðandi. Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki í sáttmálanum millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 4. august 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu sendast til:

Vinnumálaráðið
Postsmoga 377
Tinganes
110 Tórshavn

Áhugað eru vælkomin at ringja til Arna Poulsen á telefon 556070.